# Svenskur seinnapartur í Norðurlandahúsinum



Bólkurin Nomo Daco

**Leygardagin bjóðar Norðurlandahúsið til ein forvitnisligan seinrapart við svenskum listafólkum, nútímans dansarum, rithøvunda og tónleikara. Øll eru tey úr Umeå í Svøríki**

SVENSKT
*Tíðindi úr Norðurlandahúsinum*

Rithøvundurin Katarina Mazetti telist millum mest lisnu svensku rithøvundar júst nú. Hon er født í 1944, er útbúgvin lærari og journalistur. Fyrstu ferð hon gjørdi vart við seg sum rithøvundur var í 1990. Í 1998 gav hon út skaldsøguna "Grabben i graven bredvid", ein kærleikssøga, har bóndin og bókavørðurin finna kærleikan - á kirkjugarðinum.

Skaldsøgan, sum er millum mest seldu í svenskum bókabúðum beint nú, varð í fjør gjørd til film, sum Kjell Sundvall leikstjórnaði. Filmurin, sum varð frumsýndur í Svøríki í august, gongur enn fyri fullum húsum. Sami leikstjóri hevur serliga lagt seg eftir at lýsa viðurskifti á bygd, oftani á ein bersøgnan hátt.

## Modernaður dansur

Bólkurin Nomo Daco telur fimm yrkislærdar limir, sum arbeiða við fríum dansi. Tey funnu saman í Umeå í fjør vár. Áður hava tey hvør í sínum lagi arbeitt við modernaðum dansi, breakdance, locking, jazzdansi og kung fu. Hóast modernaður, hevur bólkurin Nomo Daco eisini gjørt eina framførslu, sum byggir á norrønu gudalæruna. Ungu limirnir, sum hava annan fótin í dagsins ungdómsmentanini og hin í skúlaða nútíðar dansinum, eru Anna Ehnberg, Lina Lundin, Jimmy Nordvoll, Jakob Isaksson og Emil Rosen. Stílurin er persónligur, har ymsu dansararnir sleppa framat, men í einari kollektivari koreografi.



Torbjörn Näsbom



Katarina Mazetti



Úr filminum »Grabben i graven bredvid«

## Bach á hørpu

Torbjörn Näsbom er yrkislærdur tónleikari við klassiskari violin sum sergrein. Hann hevur lisið tónleik m.a. á kongaliga musikkonservatoriunum í Brússel. Seinastu fýra árini hevur hann serliga lagt seg eftir at tillaga J.S.Bach og Marin Marais til svenska ljóðførið "nyckelharpa".

Torbjörn hevur spælt í svenskum, finskum og russiskum symfoniorkestrum og hevur verði á konsertferð við nøvnum sum til dømis Ann-Sofi von Otter.

– Umframt klassiskan tónleik, spæli eg sjálvandi eisini fólkatónleik, sigur Torbjörn Näsbom. "Hann havi eg altíð við mær, fólkatónleikin. Pápi mín var spælimaður og lærari í tónleiki og fremstu fyrimyndir mínar eru Eric Sahlström og Viksta-Lasse frá Upplandi".

## Rundferð

Tiltakið við ferðandi svensku listafólkunum byrjar í Norðurlandahúsinum leygardagin klokkan 16. Danisbólkurin Nomo Daco fer at framføra modernaðan dans, rithøvundurin Katarina Mazetti fer at lesa úr egnum verkum og Torbjörn Näsbom fer at spæla á nyckelharpu. Eftir framførsluna, sum varir hálvan annan tíma, verður høvi at skifta orð við svensku listafólkini, sum fegin vilja knýta føroysk sambond.

## Umeå og Útnorður

Svensku listafólki sum vitja í Føroyum, fara eisini til Reykjavíkar og Akureyri at framføra somu skrá. Umframt at framføra, er eisini ætlanin at víðka um sambandið við Útnorður. Fyrsta stig í hesum sambandi tók Norðurlandahúsið í Føroyum og Íslandi, tá føroysk og íslendsk listafólk vitjaðu í Umeå í Svøríki í oktober fyrrárið.

Atgongumerki til svenska seinrapartin í Norðurlandahúsinum leygardagin 15. mars klokkan 16 fáast fyri 100 kr í Húsinum.







# Bilar

Nr. 50 • hósdagur • 13. mars 2003 • 77. árg.


# Daewoo - fleiri nýggjheitir á veg



*Daewoo Kalos. Ein nýggjur bilur sum í fyrstu atløgu kemur sum hatchback við 5 hurðum og 1,4 litur motori við 83 hk*



*Daewoo Evanda er ein stórur bilur í stødd við Ford Mondeo og VW Passat. Uttan fyri Evropa eitur bilurin Daewoo Magnus*

**Eftir nøkur ár við óvissu um framtíðina hjá Daewoo, verður koreanska verksmiðjan nú stýrd av General Motors. Við hesum samstarvi byrjar ein nýggj tíðarrokning hjá Daewoo. Fleiri nýggir Daewoo bilar eru á veg**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Nýggja felagið eitur GM Daewoo Auto & Technology Company. Hetta felag hevur yvirtikið verksmiðjurnar og eina menningarmiðstøð í Suðurkorea og eina stóra eykalutagoymslu í Hollandi.

Fyrsti bilurin í nýggja samstarvinum er Daewoo Kalos, ið nú kemur á marknaðin. Kalos er teknaður av italska bildesignaranum Giugiaro. Talan er um ein bil í umleið somu stødd sum t.d. Citroën C3 og Skoda Fabia við smartum og nútímans linjum.

Motorurin er ein 1,4 litur 4 syl. bensin við 83 hk. Bilurin kemur í fyrstu atløgu sum hatchback við 5 hurðum, seinni kemur ein útgáva við 3 hurðum og ein sedan.

Umframt Kalos kemur ein heilt nýggjur Daewoo Evanda, ið avloysir fyri tann størra Daewoo Leganza. Tann bilurin er í stødd við Ford Mondeo og VW Passat. Uttanfyri Evropa eitur tann bilurin Daewoo Magnus. Í oktober kemur ein avloysari fyri Daewoo Nubira. Kalos og Evanda koma á føroyska marknaðin í apríl/mai, sigur Jens Petur Jensen sølumaður hjá P/F Esmar Simonsen, Daewoo umboðnum á Kambsdali.



*Kalos er designaður av italska bildesignaranum Giugiaro*



*Daewoo Kalos innan. Alt í evropeiskum stíli*